# Føroyar mugu raðfesta gransking hægri

**– Landið eigur at staðfesta, at tað er nógv gransking, sum skal gerast næstu árini. Latið okkum tí fáa tey oljufeløgini, sum ætla sær at vera her, til eitt felags forstáilsi um, hvussu vit skipa henda so týðandi partin av tilgongdini. Tað hevði eisini verið lættari fyri oljufeløgini. Tað er eingin meining í, at tey skulu standa inni fyri hesi gransking sigur Jógvan Mørkøre**



*Jógvan Mørkøre, samfelagsfrøðingur: – Vit skulu ikki bera so stóran ótta fyri vandanum við eini oljuvinnu. Vit mugu heldur royna at síggja møguleikarnar sigur Jógvan Mørkøre, ið heldur granskingina hava stóran týdning í hesum høpi*
*Mynd Jens K Vang*

GRANSKING OG SAMFELAG
*Jan Müller*

Tá tosað verður um komandi samfelagsgranskingina í Føroyum viðgongur Jógvan Mørkøre, samfelagsfrøðingur, at vit mangla fólk og data. Men harfyri kunnu vit ikki bara byggja alt hetta á útlendskar ráðgevarar. Teir eru skiftandi, koma og fara. Tað mugu vera fólk á staðnum, sum arbeiða við hesum – sjálvandi í samstarvi við útlendingar. – Vit mugu byggja upp egnan førleika við fólki, sum framhaldandi skulu vera við til at byggja hetta samfelagið upp. Tað er ein stór uppgáva, og fyrst og fremst ein samfelagsuppgáva, ið man áleggur politikarunum at skipa fyri. Vit tosa um vitanarsamfelagið, men tað kemur ikki av sær sjálvum. Tað krevur miðvísa uppbygging, og tað krevur politikarar, ið vilja nakað.

Tí heldur Jógvan Mørkøre, at vit mugu vit ikki bara seta okkum afturá og vænta, at oljufeløgini við øllum sínum pengum skulu typpa tey holini av sær sjálvum. Har vilja eisini vera øki, ið oljufeløgini ikki vilja fara inn á av ótta fyri at verða skuldsett fyri at leggja seg út í føroysk viðurskifti.

– Tað rætta er at siga, at tey eiga at vera við til at brúka pengar til gransking og ein týdningarmikil partur er nettupp, hvat ein slík vinna fer at innibera fyri borgararnar. Tað burdi tí møguliga staðið í loyvunum, at pengar fóru í ein grunn til m.a. at brúka til slík endamál. Vitan um okkara egna samfelag og hvussu tað ávirkast av nýggjum avbjóðing er sera sera týdningarmikil heldur samfelagsfrøðingurin fyri.

## Samfelagsgranskingin kann læra av GEM

Tá hugt verið í bakspeglið heldur Jógvan Mørkøre, at tað í oljutilgongdini hevur verið náttúrligt, at granskingin er byrjað við umhvørvinum, fiskastovnum ol. Har hevur verið ein áhugaverd tilgongd, eisini við atfinningum, men sum er endað við forstáilsi í GEM, og har partarnir hava verið nøgdir, og har eitt nú Oljumálastýrið metir seg hava fingið teir upplýsingar tað hevur havt brúk fyri. Men har hevur man verið inni á einum øki, har tað ikki altíð verður tosað um fleiri valmøguleikar.

– Tá tú harafturímóti fer inn á samfelagsligar broytingar og avleiðingar, so tosa vit um ymisk sløg av samfeløgum, har man kann velja millum t.d. eitt grønt samfelag, eitt samfelag við miðspjaðing ol. Møguleikarnir eru nógvir nettupp við oljuni, og tað kanst tú ikki bara koyra inn í eitt konsept sum tað við GEM og so fáa eina frágreiðing til Oljumálastýrið sum síðani fer til politikararnar og sigur, at soleiðis skal tað gerast. Men givið er, at man kann læra nógv av GEM-tilgongdini.

Jógvan Mørkøre heldur, at hetta við samfelagsavleiðingum og granskingini er nakað, sum skal út til eitt breitt orðaskifti. Tað er ein partur av demokratiinum. – Man hevur tosað um at seta eitt nýtt ráð til at taka sær av hesum. Alt gott um tað. Men man skal vera greiður yvir, at uppgávurnar eru ikki av sama slag sum tær fyrstu, ið jú vóru av meira tekniskum slag. Vit tosa um samfelagsbroytingar, har vit longu hava eitt »ráð«, ið skal taka støðu í slíkum viðurskiftum okkara alra vegna. Tað er løgtingið. Tað ráðið situr longu. At man so hevur nevndir og ráð at gera tilfar til løgtingið er nakað annað.

## Nógv gransking gerast

Samfelagsfrøðingurin heldur, at landið eigur at staðfesta, at tað er nógv gransking, sum skal gerast næstu árini. – Latið okkum tí fáa tey oljufeløgini, sum vera her næstu árini, til eitt felags forstáilsi um, hvussu vit skipa tann partin. Tað hevði eisini verið lættari fyri oljufeløgini. Tað er eingin meining í, at tey skulu standa inni fyri hesi gransking sigur Jógvan Mørkøre, ið heldur, at tað nyttar heldur ikki bara og sita afturá og bíða eftir, at pengarnir skulu koma av sær sjálvum frá oljufeløgunum. Tað er hvørki rætt yvirfyri oljufeløgunum og uppaftur minni fyri Føroya fólk.

Men hvussu heldur samfelagsfrøðingurin, at vit skulu vit so koma víðari við hesum!

Hann vísir á, at hetta er ikki bara ein uppgáva fyri Oljumálastýrið, sum eisini hevur lagt upp til Mentamálastýrið at arbeiða meira miðvíst við gransking í sambandi við eina oljuvinnu. Oljumálastýrið skal bara siga gott fyri játtanunum, sum koma frá oljufeløgunum. Avgerðin um hvat skal granskast liggur tí aðrastaðni. Mentamálastýrið má tí til at stinga út í kortið ein granskingarpolitikk, ið leggur upp til, at hesar uppgávurnar verða røktar frá føroyskari síðu. Tað er ikki uppgávan hjá Oljumálastýrinum at tryggja sær, at oljufeløgini røkja hesa uppgávu. At man so kann tengja bæði tingini saman og siga, at tað eru pengar, sum náttúrliga kunnu fara yvirum, er so eisini eitt.

Jógvan Mørkøre hevur annars stóra virðing fyri arbeiðinum hjá Oljumálastýrinum. Tað hoyrir man næstan bara lovorð um. Har Oljumálastýrið hevur sæð trupulleikar, er tað eisini farið eftir teimum.

## Tvær tjóðir í einari

Higartil hevur tað sum heild verið so, at oljufeløg hava skula gjørt kanningar á tí øki tey fara inn á, tvs. hvørjar avleiðingar teirra virksemi hevur á fisk, umhvørvi osfr. Og so hevur man sæð tey gera kanningar av avleiðingum í lítlum samfeløgum, t.d. hvørjar bygdir verða fyri ávirkan. Føroyska samfelagið er ikki ein lítil útjaðari í oljuhøpi. Vit tosa um alt tað føroyska samfelagið í síni heild. Vit tosa um politisku gongdina og framtíðina hjá øllum Føroyum, tá tað ræður um gransking av árinum frá eini oljuvinnu.

Jógvan Mørkøre heldur tað tí hevur sera stóran týdning, at vit brynja okkum út til hesar avbjóðingar, og hetta gera vit m.a. við at skipa fyri ráðstevnum, har málbólkurin er allur almenningurin, og har tað koma fólk aðrastaðni frá at greiða frá sínum royndum. Tað er eisini umráðandi at fáa fólk higani út í onnur lond, tað veri seg granskarar, politikarar, vinnulívsfólk o.o.

– Síðani mugu vit til at gera støðiskanningar og menna førleikan. Tað krevur ein útbúgvingar- og granskingarpolitikk, soleiðis at tú fært sett hesi fólkini við, sum skulu menna førleikan, ið skal til. Til tess krevst ein rúgva av PHD verkætlanum, har tað eisini verður hugsað um at fáa størv til fólkini eftir lokna útbúgving.

## Síggja møguleikar

Jógvan Mørkøre heldur ikki, at vit skulu bera so stóran ótta fyri vandanum við eini oljuvinnu. Vit mugu heldur royna at síggja møguleikarnar. – Tað ringasta, ið kann henda, er, at vit fáa tvær tjóðir. Tvs. at tað verður bara eitt vakstraróki, ið kemur at liggja í miðøkinum, og so vera øki, sum Suðuroy, Sandoy ol., ið vera snørd av. Onnur øki uttan fyri høvuðsstaðin, Eysturoynna og flogvøllin kunnu tá fáa tað trupult av oljuni, og tað er nakað man má fyrihalda seg til. Oljuvinnan kann í ringasta føri koma at vera nøkrum til stóran fyrimun og kanska gera lívið truplari hjá øðrum. Vit tosa um fullveldi og um at verða ein tjóð. Við slíkari gongd kunnu vit gott enda sum tvær tjóðir. Stóra avbjóðingin er at fáa eina menning, sum kann koma øllum til góðar.

## Hava ikki góða tíð

– Tað eru tey, sum siga, at vit hava góða tíð at fyrireika okkum, tí enn eru lønandi oljufund ikki staðfest?

– Tað hava vit sagt alt ov leingi. Nú mistu vit tíð orsakað av Menasfrágreiðingini. Vit áttu at lagt tað aftur um okkum sum skjótast og sett ferð á stórfingnar og miðvísar ætlanir, hvussu vit sjálvir loysa hetta og møguliga við tí stuðuli, sum krevst, frá eitt nú oljufeløgunum.

Jógvan Mørkøre tekur at enda í aftur Menasfrágreiðingina, sum hevur verið orsøkin til samrøðuna. – Eg veit ikki um vísindaliga ambitiónin var so øgiliga stór. Hetta var fyrst og fremst ein innleiðandi kanning av tí, sum er og ikki er, síðani eitt orðaskifti um tað og hvørjir problemstillingarnir eru. Sum útgangsstøði er hetta í lagi. Út frá tí eigur man so at fara í gongd við verkætlanir. Nakað kundi verið gjørt sum PHD verkætlanir og nakað, sum vit ikki hava førleika at gera, kundi so verið gjørt aðrastaðni. Nú er at koma víðari.



*Søgu- og samfelagsdeildin á Fróðskaparsetrinum heldur til í hesum hølunum í J. C. Svabosgøtu í Havn*



# Kvinnuhúsfundur í Klaksvík

**Hóskvøldið var ein fundur um virksemið hjá Kvinnuhúsinum hildin í hølunum hjá Húsmøðrafelagnum í Norðoyggjum. Elin Reinert Plank, leiðarin, greiddi fyrst frá arbeiðinum í Kvinnuhúsinum. Og so var møguligt hjá áhoyrarunum at seta spurningar**



*Uppmøtingin var so sum so…*

KVINNUHÚS
*Solby A. Eliasen*

**Klaksvík:** Nógvir spurningar komu upp at venda, og millum annað varð spurt, um tað er størri tørvur á einum kvinnuhúsi í miðstaðarøkinum, ella tað eisini átti at verið eitt líknandi hús í útjaðarnum.

– Onki talar fyri at harðskapur og tílíkt kemur meira fyri í miðstaðarøkinum enn í úti á bygd. Men tað er verri fyri kvinnur á bygd at koma til Havnar, tí tað er ikki vist, at tað letur seg gera, júst, tá tær hava tørv fyri tí. Men tað ber altíð til ringja til okkum.

Annars hava vit eisini spurt kvinnur, sum eru komnar av bygd til okkara, um tær høvdu heldur viljað, at tað var eitt kvinnuhús í teirra nærumhvørvi, men tá hava tær sagt, at tað eru ov smá forhold til nakað tílíkt í heimbygdini, greiddi Elin frá.

Kvinnurnar, sum hava búð í kvinnuhúsinum hava verið í aldrinum 18 til knapt 70 ár. Tað eru tó mest kvinnur í 30-unum og 40-unum, sum koma har. Tað er ofta, at tær bíða við at koma, til børnini eru vaksin, tí tær hildu, at tað var best at bíða. Tá tær so koma, halda tær tað vera ov seint.

## Rúsur ikki altíð orsøkin

– Tað er ikki altíð at rúsur upp í, tá ið kvinnur verða útsettar fyri likamligum harðskapi. Onkuntíð eru kvinnur, sum koma, sjálvar rúsaðar, men tá biðja vit tær at avrúsa seg áðrenn tær koma aftur. Vit vísa hesum kvinnum á støð, har tær kunnu fáa hjálp til avrúsing.



*Elin Reinert Plank, leiðari í Kvinnuhúsinum*

## Fleiri og fleiri útlendskar kvinnur

Tosað var eisini um, at nú Føroyar hava yvirtikið útlendingalógina, so átti tað verið gjørt meira við at fyrireika útlendsku kvinnurnar uppá at búgva her og lært tær málið. Tí tað er eyðsæð, at tær hava torført við at finna seg til sættis her, tá tær hvørki skilja ella tosa málið. Elin segði, at tær kvinnurnar, sum hava verið har siga, at tær eru í eini sera ringari tvístøðu, tí tær ikki trívast her, men hava onki at fara heimaftur til.

## Børnini við mammunum

Tá ið kvinnur koma til Kvinnuhúsið við børnum, skulu børnini eisini hava hjálp til at koma víðari og yvir tað, sum tey hava verið vitni til ella út fyri. Tað verður gjørt á tann hátt, at børnini skulu sleppa at tosa um bæði mammuna og pápan. Og tað verður roynt at læra tey, at vaksin eru til at líta á. Oftani eru hesi børn fleiri ferðir svikin av øðrum vaksnum eisini, umframt foreldrunum tí at tey hava roynt at sagt onkrum frá tí, ið tey koma út fyri, men tann vaksni roynir bert at tiga tað burtur, líka sum foreldrini gera. Børnini vita, at tað, at mamma verður bukað, er ikki nakað, sum man tosar hart um, men onkuntíð hava tey samlað sær mót til at siga onkrum tað, og so fáa tey onga hjálp. Tað er hart, segði Elin Reinert Plank.

## Vegleiða og hjálpa

Kvinnurnar, sum eru her, mugu sjálvar taka avgerðina, um tær fara heimaftur ella finna sær ein bústað aðrastaðni. Vit vegleiða teimum og hjálpa teimum til at tosa um trupulleikarnar. Vit biðja tær ikki fara frá manninum, tað er ein avgerð, sum tær koma til sjálvar. Vit eru ikki semingsfólk. Tá pør hava spurt um parterapi, vísa vit teimum til prest, prædikumann ella sálarfrøðing. Men í summum førum er tað ein trupulleiki, at tað kostar at fara til sálarfrøðing. Men sum ein av áhoyrarunum segði:

– Vit brúka nógvar pengar upp á rammuna, men alt ov lítið til myndina.

## Heldur kvinnuhúsið enn familju

Nógvar kvinnur siga, at tær halda tað vera betri at koma til Kvinnuhúsið og tosa um trupulleikarnar, tí at vit eru uttanfyristandandi, kenna ikki umstøðurnar, meðan familjan, sum tær kanska eru rýmdar til meira enn eina ferð, troyttast og heldur yvirhøvur ikki, at nakað gott er í manninum. Men tað er ein sannroynd, at kvinnunum tørvar eisini at tosa um tær góðu síðurnar hjá manninum og at umskylda, at støðan er sum hon er.

## Endamálið var upplýsing

Berhardina Klein úr áhugabólkinum hjá Húsmøðrafelagnum sigur, at endamálið við hesum fundinum var, at upplýsa um evnið. Tað kann til tíðir vera trupult at fáa fólk at tosa um eitt slíkt evni, men um man gevur sær góða tíð og letur fólkið sita og práta eina løtu, so koma spurningarnir av sær sjálvum. Uppmøtingin var so sum so, men hetta er jú eitt eymt evni, sum fólk kanska aftra seg við at tosa um. Hon leggur afturat, at áhugabólkurin var vælnøgdur við fundin hóskvøldið.

# Kjølbro skal standa á Biskupsstøð

**Nógv umtalað standmyndin av Kjølbro verður væntandi avdúkað á Norðoyastevnu**

MENTAN
*Ragnhild Ellingsgaard*



**Klaksvík:** À fundi hjá Mentunarnevndini mikudagin varð samtykt, at nógv umtalaða standmyndin av Kjølbro skal standa á Biskupsstøð.

– Tað er púra satt, at málið hevur ligið stilt alt ov leingi, sigur Steinbjørn Jacobsen, borgarstjóri.

– Men málið er nú samtykt av Mentunarnevndini, og næsta týsdag kemur tað so fyri býráðnum, har tað uttan iva eisini verður samtykt, greiðir Steinbjørn frá.

Økið á Biskupsstøð skal fríðkast, alt sum tað er, og verður hetta vónandi liðugt áðrenn Norðoyastevnuna.

Ætlanin er so, at standmyndin skal avdúkast á sjálvari stevnuni.

Tað var Norðoya Sparikassi, sum í 1999 lat Klaksvíkar Býráði standmyndina av hesum megnar vinnulívsmanni.

Beinanvegin varð farið undir at gera eina sera kostnaðarmikla ætlan, viðvíkjandi hvar standmyndin skuldi setast. Men ætlanin gjørdist ov kostnaðarmikil, og málið datt niðurfyri.

Býráðið hevur síðan tá roynt at funnið eina aðra loysn, og nú sýnist endiliga at vera komið á mál.

Tað er Hans Pauli Olsen, listarmaður búsitandi í Danmark, sum hevur tilevnað standmyndina av manninum, ið allir klaksvíkingar eru so stoltir av.



# Pjerrot vitjar í Klaksvík

**Mikudagin fáa øll børnini í Klaksvík møguleika at heilsa uppá heimskenda klovnin Pjerrot**

UNDIRHALD
*Ragnhild Ellingsgaard*

Mikudagin tann 20. februar verða øll børnini í Klaksvík boðin til eina stuttliga og spennandi framførslu við klovnum, búktalara, sangi og tónleiki.

Tað er Silvi, sum stendur aftan fyri hesa innbjóðing, og á skránni verður eisini heimskendi klovnurin Pjerrot, sum nógv munnu kenna frá donsku stuttleikaparkini »Bakken«.

Umframt Pjerrot verða føroysku klovnarnir Fjotti & BoBo, búktalarin Absalon Àargarð og Silvi sjálvur við í tiltakinum.

Silvatiltakið verður á skránni tríggjar ferðir mikudagin:

Frá kl. 10.00 til 11.00: Børn undir skúlaaldur

Frá kl. 13.00 til 14.00: Børn millum 7 og 9 ár

Frá kl. 16.00 til 17.00: Børn millum 10 og 12 ár